Upprunahandriti› til Barbaru:

Ongantí› veri› burtur

Upprunahandriti› hevur ongantí› veri› burtur. Ta› er beinlei›is skeivt, sum kom fram, tá 100 ára fø›ingardagurin hjá Jørgen-Frantz Jacobsen var› hátí›arhildin í Nor›urlandahúsinum mikukvøldi›, at upprunahandriti› nú var› funni› aftur, og at danski bókmentagranskarin Hanne Flor Sørensen hevur funni› ta› aftur. Skal ein finna naka›, so má ta› fyrst vera horvi›, og upprunahandriti› til Barbaru hevur ongantí› veri› horvi›. Heinesenfamiljan hevur goymt handriti› í 62 ár.

UPPRUNAHANDRIT
Stefan í Skorini

Upprunahandriti› til bókina “Barbara” hevur veri› í húsunum hjá familjuni hjá Williami Heinesen í 62 ár, til ta› var› lati› familjuni hjá Jørgen-Frantzi í sí›stu viku. Mikudagin lat familjan hjá Jørgen-Frantzi Landsbókasavninum handriti›, men æruna fyri at hava funni› handriti› aftur fekk Hanne Flor Sørensen, sum hevur granska› í skaldskapinum hjá Jørgen-Frantzi. Eftir standa næstringarnir hjá Williami sum kánus, tí ta› eru teir, i› hava var›veitt upprunahandriti› í samfull 62 ár, men fingu onga tøkk fyri ta›.

Zacharias Heinesen, sonur mæta skald okkara William Heinesen, hevur havt upprunahandriti› til Barbaru, sí›an mamma hansara, Elisa, lat honum ta› í var›veitslu fyri fáum árum sí›ani.

Hósdagin í sí›stu viku gjørdi familjan av at lata næstringum hjá Jørgen-Frantzi handriti›, so at tey kundu lata Landsbókasavninum ta›. Nú er ta› sostatt ogn Føroya fólks.

Ta›, sum Zacharias í hesum sambandi fílist á, er, at ta› ikki hevur veri› nóg væl kunna› um søguna hjá handritinum. Hanne Flor Sørensen fær hei›urin fyri at hava funni› handriti› aftur, hóast ta› ongantí› hevur veri› burtur.

Teirra familja ver›ur næstan ikki tikin uppá tunguna í sambandi vi›, at handriti› skal vera komi› undan kavi aftur. Ta› hevur ligi› uppi hjá teimum, sí›an William fekk ta› í 1938.

Ta› hevur annars veri› at hoyrt, at handriti› er mist burtur, og at Hanne Flor hevur funni› ta› aftur.

– Handriti› hevur ongantí› veri› burtur, men ta› hevur altí› ligi› trygt og gott hjá foreldrum mínum. Tó er ta› Hanne Flor, sum skal hava funni› handriti› aftur, og vit standa undrandi, sigur Zacharias Heinesen.

Zacharias Heinesen harmast um, at ta› er ført fram, at Hanne Flor Sørensen hevur funni› upprunahandriti› aftur, og at hon hevur fingi› upprunahandriti› undan kavi, tá ta› ongantí› hevur veri› burtur

Harmast stø›una

Zacharias og familja hansara eru ikki sørt hørm um, at fólk kunnu hava fingi› ta fatan, at handriti› hevur veri› burtur, tí ta› hevur ta› sambært teimum ongantí› veri›.

Hanne Flor Sørensen hevur fingi› loyvi frá familjuni hjá Williami, at granska í brævaskiftinum millum William og Jørgen-Frantz. Hesi brøv liggja á Det Kongelige Bibliotek í Keypmannahavn og fyri at granska í teimum, skal ein hava loyvi frá næstringunum. Hanne Flor Sørensen hevur í tíggju ár granska› skaldskapin hjá Jørgen-Frantzi, og hon fer í næstum at geva út bók um skaldi›.

Av tí at Hanne Flor granska›i skaldskapin hjá Jørgen-Frantzi, helt Zacharias, at tey ikki skuldu fjala naka›, og lat henni tí ymiskt tilfar úr teirra goymslum, sum hev›i vi› Jørgen-Frantz at gera. Harímillum var upprunahandriti›.

– Avtalan var, at hon ikki skuldi fara ví›ari vi› nøkrum av hesum, men tann avtalan er ikki hildin. Tilfari› hevur hinvegin veri› víst fram, sigur Zacharias.

Zacharias sigur, at teirra ætlan var allatí›ina, at handriti› skuldi latast Landsbókasavninum. Men tá familjan hjá Jørgen-Frantzi kravdi at fáa handriti›, var› ta› fyrst lati› teimum ísta›in. Hetta var› gjørt, eftir at familjan hev›i tingast um, hvat gerast skuldi vi› handriti›.

– Vit hildu, at ta› var uppá sítt pláss, at lata familjuni hjá Jørgen-Frantzi handriti›, og hon kundi sí›ani lata Landsbókasavninum ta›.

– Á samkomu í Nor›urlandahúsinum mikudagin, takkar Súsanna Danielsen Hanne Flor Sørensen fyri at hava funni› handriti› aftur, og ta› undrast vit stórliga yvir. Hanne Flor hevur ikki fingi› loyvi frá okkum at róta í okkara goymslum, sigur Zacharias.

Súsanna er kedd av hesum

– Um familjan hjá Williami Heinesen følir seg nipna í hesum her, so eri eg kedd av tí, og eg eri sera takksom fyri, at tey hava goymt handriti› í so nógv ár. Eg var kanska eitt sindur ørkymla›, sigur Súsanna Danielsen, sum er systurdóttir Jørgen-Frantz.

– Eg havi ikki vita› naka› um hatta handriti›, og Hanne Flor hevur spurt eftir tí í langa tí›, og eingin hevur vita› naka› um ta›. Eg meini enn, at hon hevur gjørt eitt stórt arbei›i fyri at finna ta› fram, men harvi› vil eg ikki taka naka› frá teimum, sum hava goymt ta› í 62 ár, og eg eri gla› fyri ta›.

Upprunahandriti›

Zacharias grei›ir frá, at tá Jørgen-Frantz anda›ist í 1938 hev›i hann naka› av skuld, og tí leg›i skiftirætturin hald á búgv hansara. Harímillum var handriti› til Barbaru.

William Heinesen, Kristian Matras og Trónd Olsen vildu hava handriti› loyst, tí teir høvdu ætlanir um at geva ta› út í bók, men ta› var ov kostna›armiki› at keypa leyst.

– Teir gjørdu alt fyri at fáa hendur á handritinum, tí teir høvdu ætlanir um at geva ta› út, men ta› gekk rúm tí›, á›renn ta› var› leysgivi›.

Teir fóru sí›ani til Gyldendal vi› handritinum, men ein ritstjóri har, ráddi teimum frá at geva ta› út í tí líki, ta› var í, av tí at naka› vanta›i í søguni.

William tók sí›ani ta uppgávu á seg at leggja seinastu hondina á verki›, og so var› bókin útgivin. Bókin seldi avbera væl, og hon rinda›i skuldina hjá Jørgen-Frantz.

Upprunahandriti›, sum Jørgen-Frantz skriva›i, liggur nú á Føroya Landsbókasavni, og vit eiga ta› øll.

Jørgen-Frantz var› hei›ra›ur

Stefan í Skorini

Í sambandi vi› at ta› eru li›in hundra› ár, sí›an Jørgen-Frantz Jacobsen var› borin í heim, var› skipa› fyri kvøldsetu í Nor›urlandahúsinum, sum var› fullsett

Á tí stóru samkomuni mikukvøldi› handa›i systurdóttir Jørgen-Frantz Jacobsen, Súsanna Danielsen, Føroya Landsbókasavni upprunahandriti› til bókina Barbara.

Danin Hanne Flor Sørensen, sum í tíggju ár hevur granska› arbei›i› hjá Jørgen-Frantzi, helt fyrilestur. Hon fer at geva út bók næsta ár um sambandi› millum Jørgen Frantz og William Heinesen.

Eitt kór framførdi verk eftir Trónd Bogason, og Petra Iversen sang Sorrig og Glæde eftir Kingo.

Urd Johannesen hev›i fyrilestur um verkætlanina Fer›in, sum hon arbei›ir vi›. Jørgen-Frantz hevur skriva› Fer›ina. Sunnleif Rasmussen hevur gjørt tónleikin, sum ver›ur n‡ttur.

Ta› skal merkjast ordiligt

– Fer Løgtingi› at blanda seg uppí trætuna um teir, sum skulu sigla vi› n‡ggja vaktarskipinum, Brimli, fara vit at helst at bi›ja allar maskinmeistarar á almennum og hálvalmennum stovnum at siga upp. Og ta› fer at leggja alt landi› lami›, sigur Finnleif Guttesen, forma›ur í Maskinmeistarafelagnum

SÁTTMÁLATRÆTA
Áki Bertholdsen

– Fer Løgtingi› at leggja seg uppí trætuna um sáttmálan hjá teimum, sum skulu sigla vi› n‡ggja vaktarskipinum, Brimli, er ta› maktmisbrúk at grovasta slag. Og ta› er so álvarsamt, at ta› skal merkjast ordiligt.

Finnleif Guttesen, forma›ur í maskinmeistarafelagum sigur, at í nevndini í felagnum er ongin slingur í valsinum.

– Vit eru púra samdir um, at leggur løgtingi› seg uppí máli›, er ta› so álvarsligt, at so ver›a tiltøk sett í verk, sum fara at merkjast ví›a um í samfelagnum.

Hann sigur, at nevndin í felagnum hevur tosa› nógv um, hvørjir møguleikar eru fyri at seta tiltøk í verk, um ta› skuldi hent, at løgtingi› blandar seg uppí sáttmálatrætuna.

Maskinmeistarafelagi› fer at taka ta› ógvuliga illa upp, um Løgtingi› finnur uppá at blanda seg uppí trætuna um sáttmálan ha teimum, sum skulu sigla vi› Brimli. Ta› er maktmisbrúk av grovasta slag og so fara vit at svara aftur so ta› merkist ordiliga, sigur Finnleif Guttesen. Hósdagin hev›i maskinmeistarafelagi› kunnandi fund fyri limirnar um stø›una

– Ein møguleiki, sum liggur rættiliga frammaliga hjá nevndini er, at leggur løgtingi› uppí, fer Maskinmeistarafelagi› at svara aftur vi› at bi›ja allar maskinmeistarar á almennum og hálvalmennum stovnum siga upp.

– Hetta fer at raka Vaktar- og Bjargingartænastuna, Strandfer›sluna, SEV, heilsuverki› og a›rar stovnar og a›rar fyritøkur.

– Og ta› sigur seg sjálvt, at ver›a hesir stovnar lagdir lamnir, ver›ur kreppa í samfelagnum, tí streym, heilsuverk og strandfer›slu kunnu vit ikki vera fyriuttan.

Finnleif Guttesen ivast ikki í, at kemur ein áheitan frá felagnum, fara maskinmeistarar at fylgja henni.

– Maskinmeistararnir hava ein mána›a uppsagnartí›. Og siga allir upp ísenn, ver›ur landi ógvuliga hart rakt.Tey almennu størvini í Føroyum eru ”onki at samla uppá” sum hann tekur til, tí tey eru ikki so væl lønt.

– Ta› stendur ikki á at fáa størv a›rasta›ni, sum eru nógv betri lønt, sigur Finnleif Guttesen.

Maktmisbrúk

Men løgtingi› hevur á›ur lagt seg út í ósemjur á arbei›smarkna›inum?

– Ja, men ta› kann ikki samanberast vi› hesa stø›una. Ta›, sum Løgtingi› á›ur hevur gjørt, er, at teir hava gjørt eitt semingsuppskot til lóg, tá i› partarnir annars hava veri› nær hvørjum ø›rum.

– Ta›, sum her er talan um, er, at vit hava eitt heilt n‡tt arbei›spláss, sum ongin sáttmáli er fyri yvirhøvur. Og fer Løgtingi› at blanda seg uppí, er hetta ta› sama sum at tvinga fólk til arbei›is á einum n‡ggjum arbei›splássi. Og ta› er maktmisbrúk av allar ringasta slag.

– So kann ta› næsta ver›a, at Løgtingi› eisini fer at nokta fólki at siga upp, sigur Finnleif Guttesen.

Sjálvur fryktar hann fyri, at endin ver›ur, at tingi› leggur uppí.

– Tá i› máli› er enda› á landsst‡risfundi, er væl hugsandi, at fari› ver›ur longri tí landsst‡ri› kann onki gera einsamalt - uttan at ganga okkara krøvum á møti.

Hann heldur eisini, at veruliga endamáli› vi› royndini at fáa semingsmann uppí, er, at fáa hann at gera eitt uppskot, sum sí›ani kann ver›a lagt fyri tingi›, um ta› ver›ur vraka›. Sjálvur heldur hann, at ta› er so langt ímillum partarnar, at ta› er nyttuleyst at fáa semingsmann uppí.

N‡ggj stø›a

Ellintur Abrahamsen, forma›ur í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, er ikki so avgjørdur, sum starvsfelagi hansara í maskinmeistarafelagnum.

– Ta› einasta, hann sigur, er, at leggur tingi› uppí, hevur ein n‡ggj stø›a tiki› seg upp og so tekur Skipara- og Navigatørfelagi› stø›u útfrá tí.

Heldur ikki Ellintur Abrahamsen væntar, at naka› fer at koma burturúr einum møguligum semingsmanni.

– Skuldi hann lagt eitt uppskot fyri okkum, i› bara so miki› sum skerjir okkara lænarkrøv eina helvt, ver›ur ta› sópa› av bor›inum, sigur hann.

Annars stúrir hann fyri tí sama sum Maskinmeistarafelagi›, at hetta fer at enda vi›, at eitt møguligt semingsuppskot fer at ver›a vraka›, men at ta› sí›ani fer at ver›a lagt fyri tingi›.